## Bøtt er um røktartørvin



Nes kommuna hevur verið við í útbyggingini av Eysturoyar Røktar-og ellisheimi. Útbyggingin, sum fevnir um 24 búrúm, varð tikin í nýtslu á vári 2006. Hetta hevur bøtt munandi um røktartørvin á eldraøkinum í kommununi. Ætlaði parturin hjá Nes kommunu skuldi verða umleið 2 miljónir krónur, men byggingin gjørdist nógv dýrari, soleiðis at endaligi parturin gjørdist 4 miljónir krónur. Í 2004 bygdi Nes kommuna eldrasambýlið Vesturskin til 16 búfólk. Eldrasambýlið hevur virkað væl, bæði fyri fólk úr Nes kommunu, men eisini fyri fólk úr øðrum kommunum, sum hava búð á heiminum í styttri ella longri tíð.

## Nýggj tilráðing um vatn

Í frágreiðingini til samandráttin um roknskapin hjá Nes kommunu fyri 2007, verður eisini nomið við drekkivatnið í kommununi. Víst verður á, at skipanin millum kommununa og Heilsufrøðiligu Starvsstovuna við vatnroyndum helt fram í 2007. Royndin at betra um góðskuna av drekkivatninum, sum varð gjørd í 2005 og 2006, verður nú eftirmett. Ein tilráðing um, hvat best er at gera, kemur at fyriliggja einaferð í 2008. Fyri at halda eina góða vatngóðsku, er kommunan farin undir at pumpa vatn úr Toftavatni, áðrenn Kornvatn minkaði ov nógv. Hetta hevur hjálpt nakað. Hóast kommunan hevur økt vatngoymslurnar við brunnum umframt tær stóru vatngoymslurnar í Kornvatni og báðum Hamravøtnunum, er vatnnýtslan økt so mikið hesi seinastu árini, at neyðugt er at pumpa úr Toftavatni.

# Nógv er bygt og fólkatalið veksur



*Nógv hevur verið bygt á Toftum og á Nesi seinastu tíðina, men nú er líkt til, at fólk aftrat seg við at seta føtur undir egið borð*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Eftirspurningurin eftir grundøkjum í Nes kommunu var stórur í 2007, men nú vísir tað seg, at fleiri av teimum, sum standa á bíðilista, kortini ikki hava ætlanir um at byggja beint nú. Tó eru framvegis nøkur sethús í gerð í kommununi**

SETHÚSABYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í vikuni hevur Nes kommuna borið í hvørt hús ein samandrátt av ársroknskapinum hjá kommununi fyri 2007.

Við í hesum tilfari eru áhugaverd tíðindi um ymiskt, sum fyriferst í kommununi.

Í partinum um búsetingar fegnast kommunan um, at ferð aftur kom á sethúsabyggingina í 2007, tá fleiri sethús vórðu bygd. Haraftrat eru nøkur aftrat í gerð, sum eru og verða liðug í ár.

- Eftirspurningurin eftir grundøkjum var og er stórur, men tó vísir tað seg, at fleiri av teimum, sum standa á bíðilista, kortini ikki hava ætlanir um at byggja beint nú.

Kommunan vísir á, at fleiri umsóknir um byggiloyvi tó eru játtaðar í útstykkingini Kvíggjarheygg/ Gadd.

- Her eru eisini nøkur sethús í gerð, og vónandi eydnast tað teimum, sum hava fingið byggiloyvi, at fara undir byggingina.

### Onnur øki

Aftrat umsóknum, sum vísa til økir, har útstykkingar eru framdar, hava fleiri borgarar eisini biðið um grundøkir ymsastaðni í kommununi fram við kommunuvegum.

- Talan er soleiðis um umsóknir um grundøkir bæði á Toftum og á Nesi, har landsvegurin frá Agninum og út á Líðarenda er vorðin kommunalur í 2007.

Nes kommuna sigur, at um ein borgari skal keypa eitt grundøki uttanfyri eina útstykking, er skipanin hon í dag, at borgarin sendir umsókn til kommununa, sum síðan keypir grundøkið frá Búnaðarstovuni og selir tað víðari til umsøkjaran.

- Tað er bert í teimum førum, tá talan er um uppplskoytisstykki, at umsøkjarin kann keypa beinleiðis frá Búnaðarstovuni.

### Fólkatalið veksur

Í 2007 vaks fólkatalið í Nes kommunu úr 1.235 upp í 1.248 fólk.

22 børn vórðu fødd hetta árið og 14 andaðust.

Nes kommuna vísir á, at tilflytingin til kommununa var 69, og av hesum komu 27 úr útlandinum og 42 úr øðrum kommunum í Føroyum.

- 64 fólk fluttu úr kommununi, harav 33 fluttu til útlandið og 31 til aðrar kommunur í Føroyum.

Samanumtikið var talan í 2007 um ein nettovøksturin í fólkatalinum í Nes kommunu upp á 13.

# Nýggj atløga og ídnaðarøki

**Økið við Rætt er planerað til tríggjar hallir, sum byggiloyvi er játtað til. Hin fyrsta er liðug, og fundamentið er stoypt til ta næstu. Hin triðja verður bygd í 2009, sigur Nes kommuna**

HAVNALAG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sum fyrsta kommuna í landinum, hevur Nes kommuna gjørt eina móttøkuskipan á havnaøkinum við fýra bingjum til rusk frá skipum og bátum. Her sleppa fiski- og útróðrarmenn av við alt vanligt rusk, eitt nú jarn, net, trol, línu, akkumulatorar og annað.

- Skip og reiðaríir hava verið væl nøgd við hesa skipan, sigur Nes kommuna, sum eisini hevur tveir oljutangar á havnalagnum til móttøku av spillolju.

Í samandrátti í ársroknskapinum hjá kommununi fyri 2007 verður eisini víst á, at Tofta havn uppfyllir heilsufrøðilig krøv, sum sett verða til havnir, og er soleiðis vorðin ISPS-góðkend.

### Atløgusíða

Í 2006 gjørdi Nes kommuna sáttmála við J&K Petersen um gerð av atløgusíðu millum Toftagjógv og bryggjuna á Nyki upp á 94 metrar við 7-8 metra dýpi.

- Hetta arbeiði er liðugt, og varð havnin tikin í nýtslu fyrr í ár.

Fyri at fáa grót til atløgusíðuna frá Toftagjógv og norðureftir, fór kommunan undir arbeiði at gera havnalagið við Rætt, sum er økið millum Rætt og Saltnes.

- Hetta byrjaði í 2007. Eitt økið upp á 150 metrar er sprongt, og neyðug nøgd av gróti varð tikin til ífyllu til nýggju atløgusíðuna. Restin av grótinum er farin til planering á staðnum.

### Økið við Rætt

Nes kommuna vísir á, at grót til økið við Rætt eisini er komið aðrastaðni, eitt nú frá arbeiðnum við Lýðarsveg.

- Økið við Rætt er planerað til tríggjar hallir, sum byggiloyvi er játtað til. Hin fyrsta er liðug, og fundamentið er stoypt til ta næstu. Hin triðja verður bygd í 2009, sigur kommunan í síni frágreiðing.

# Høganes-ætlanin bíðar eftir Skálafjarðartunlinum

**Ein orsøk til, at Høganes-ætlanin ikki er komin longri er, at Skálafjarðartunnilin ikki er avkláraður**

HØGANES-ÆTLAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í sínum samandrátti av ársroknskapinum fyri 2007, ásannar Nes kommuna, at gongd ikki kom á útstykkingina av Høganesætlanini í 2007.

Henda ætlan røkkur undan Høganesi og oman til Løkin. Eitt uppskot til fyrsta byggistig í hesi ætlan varð lagt fram á Hotel Sjómansheiminum í Runavík í 2007. Nógv fólk møttu upp til framløguna.

### Eingin avklároing

Nes kommuna noyðist kortini at ásanna, at ein av orsøkunum til, at verulig gongd ikki er komin á hesa útstykkingarætlan er, at ætlaði Skálafjarðartunlinum er komin í drag.

- Spurningurin viðvíkjandi Skálafjarðartunlinum er ikki avkláraður, og tí eru vit ikki komin longri, sigur kommunan.